## Nygaard aftur á vøllinum

Álopsspælarin Marc Nygaard, sum hevur ættarbond á Tvøroyri, spældi um vikuskiftið sín fyrsta dyst fyri besta liðið hjá Queens Park Rangers í hesum kappingarárinum. Marc hevur verið skaddur, og í farnu viku spældi hann ein hálvleik við eykaliðnum. Leygardagin byrjaði Marc Nygaard í álopinum hjá QPR, sum spælir í næstbestu ensku deildini, og hann spældi til langt inn í yvirtíðina, tá ið hann varð skiftur út. Dysturin var ímóti Plymouth á útivølli, og úrslitið var 1-1.




## Zlatan skoraði í fyrstu royndini

Svenski álopsspælarin Zlatan Ibrahimovic spældi um vikuskiftið sín fyrsta dyst fyri nýggja felagið Inter, og tað gekk væl. Inter vann dystin ímóti Fiorentina 3-2, og Zlatan skoraði eitt av málunum. Zlatan hevur annars verið í miðdeplinum fleiri ferðir í summar, og í seinastu viku var hann sendur heim frá svensku landsliðsleguni, tí hann hevði verið í býnum saman við tveimum liðfeløgum. Inter var á odda 3-0 í dystinum, men Luca Toni skoraði tvey mál seint í dystinum.

# Helgi vann í stórum stíli

**Við sigrinum leygardagin hevur Helgi Dam Ziska nú vunnið føroyameistaraskapin í snartalvi trý ár á rað.**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í frálíkum umstøðum í Læraraskúlaauluni kappaðust 35 telvarar um føroyameistaraskapin í snartalvi. Undan kappingini hevði Talvsamband Føroya aðalfund, har millum annað greitt varð frá einum hendingaríkum og góðum talvári. Virkisfýsna nevndin varð sum væntað afturvald.

### Sum ein múrur

Skipanin varð soleiðis, at níggju dupultumfør skuldu telvast. Tað vil siga, at hvør telvari hevur hvítt og svart móti sama mótstøðumanni, og hetta gevur samanlagt 18 talv.

Eftir fyrstu trý umførini var líkt til, at kappingin fór at standa millum Helga D. Ziska og John Rødgaard. Teir hittust í 4. umfari, og Helgi vann 1,5 – 0,5. Aftan á hetta streyk Helgi frá hinum. Rødgaard misti - eins og allir hinir í toppinum - okkurt óvæntað stigið á vegnum. Einans Helgi telvaði støðugt og sannførandi. 16,5 stig av 18 møguligum!

Martin Poulsen gav Helga bestu mótstøðuna. Teirra uppgerð endaði 1-1. Men annars var Helgi sum ein múrur. Har var einki hol og ógjørligt var at bróta grótmúrin niður. Ein ósvikaliga uppiborin FM-sigur til unga havnarmannin.

### Finnbjørn blandaði seg

Snarmeistarin frá ár 2000 hevði eina fram úr góða kapping. Størsta styrkin hjá Finnbirni Vang er snartalv, men kortini er hansara 2. pláss eitt sindur óvæntað. Finnbjørn fekk 14 stig.

Á 3. plássi kom Rødgaard, 3,5 stig aftanfyri Helga og 1 stig aftanfyri Finnbjørn. Rødgaard segði seg als ikki vera nøgdan við sítt avrik.

Torkil Nielsen og Martin Poulsen vóru beint niðanfyri heiðursplássini. Ungu synirnir hjá Torkili, Rógvi E. Nielsen og Høgni E. Nielsen, blandaðu seg í toppin við ávíkavist 10,5 og 10 stig.




*Helgi Dam Ziska vann FM í snartalvi sannførandi, hóast nógvir aðrir sterkir telvarar vóru við í kappingini*

## FM í snartalvi 2006

| Nr. | Telvari | Rating | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Ziska, Helgi Dam | 2352 | 16,5 |
| 2 | Vang, Finnbjørn | 2109 | 14,0 |
| 3 | Rødgaard, John | 2364 | 13,0 |
| 4 | Nielsen, Torkil | 2046 | 12,5 |
| 5 | Poulsen, Martin | 2306 | 12,0 |
| 6 | Simonsen, Ólavur | 2093 | 10,5 |
| 7 | Samuelsen, Carl E.Nolsøe | 2247 | 10,5 |
| 8 | Petersen, Terji | 2021 | 10,5 |
| 9 | Nielsen, Rógvi E. (Ratingvl. 2) | 1565 | 10,5 |
| 10 | Thorsteinsson, Sjúrður (Ratingvl. 1) | 1941 | 10,0 |
| 11 | Andreasen, Andrias | 1833 | 10,0 |
| 12 | Joensen, Jógvan | 1702 | 10,0 |
| 13 | Joensen, Óli | 1749 | 10,0 |
| 14 | Nielsen, Høgni E. | 1250 | 10,0 |
| 15 | Andreasen, Jákup á R. | 1946 | 9,5 |
| 16 | Ziska, Andrias | 1876 | 9,5 |
| 17 | Dalsgarð, Arnbjørn | 1588 | 9,5 |
| 18 | Lamhauge, Eyðun | 1707 | 9,5 |
| 19 | Jógvansson, Hjalti T. | 1476 | 9,5 |
| 20 | Reinert, Regin | 1803 | 9,0 |
| 21 | Dam, Vagnur | 1151 | 9,0 |
| 22 | Jacobsen, Heiðrikkur T. | 1483 | 8,5 |
| 23 | Berg, Margeir | 1559 | 8,5 |
| 24 | Hansen, Hanus Ingi | 1520 | 8,5 |
| 25 | Næsborg, Jens Ole | 1700 | 8,5 |
| 26 | Skorastein, Símun (Ratingv. 3) | 1000 | 8,0 |
| 27 | Hansen, Herborg | 1333 | 7,5 |
| 28 | Jacobsen, Rúni T. | 1000 | 7,5 |
| 29 | Hentze, Jóhan | 1013 | 7,0 |
| 30 | Simonsen, Jan | 1174 | 7,0 |
| 31 | Hansen, Dánjal K. | 1000 | 7,0 |
| 32 | Nielsen, Janus E. | 1000 | 6,5 |
| 33 | Andreasen, Eydna J. | 1000 | 6,0 |
| 34 | Olsen, Sára | 1000 | 5,0 |
| 35 | Poulsen, Petur | 1000 | 3,0 |

## AB og KÍ eru best fyri

Eftir fyrra finaluumfarið í kappingini millum gentur 10-12 ár er einki avgjørt. Tað verður ikki fyrrenn eftir seinna FM umfarið, sum verður á Argjum um eina viku, at FM vinnarin verður funnin.

Eftir fyrra umfarið, sum var í Klaksvík leygardagin, bendir nógv tó á, at tað fara at verða AB og KÍ, sum fara at stríðast um meistaraskapið.

Bæði AB og KÍ vunnu sínar dystir móti ÍF og B36, og í innanhýsis dystinum millum KÍ og AB endaði tað 2-2.

**FM-bólkur, Gentur 10-12**
**Úrslit, fyrra finaluumfar**
KÍ-ÍF 3-1
AB-B36 2-0
KÍ-AB 2-2
ÍF-B36 2-1
KÍ-B36 3-1
AB-ÍF 2-0

**Støðan**
1. KÍ 3 2 1 0 8-4 5
2. AB 3 2 1 0 6-2 5
3. ÍF 3 1 0 2 3-6 2
4. B363 0 0 3 2-7 0

## B68 størst úrtøku

Tað hevur hilnast illa hjá B68 og VB/Sumba í Formuladeildini í ár. At tað væl kann vera, at toftamenn og vágbingar um nøkur ár fara at fáa góða tilgongd, kundu B68 og VB/Sumba avrikið í FM-finalubólkinum í smápiltadeildini bent á. Fyrra finaluumfarið var í Klaksvík leygardagin, og har vann B68 allar sínar dystir og er tískil oddaliðið undan seinna finaluumfarinum, sum verður í Vági leygardagin

**FM-bólkur, smápiltar**
**Úrslit, fyrra finaluumfar**

| | |
|---|---|
| KÍ-VBS | 1-3 |
| B68-HB | 3-2 |
| B68-KÍ | 1-0 |
| HB-VBS | 1-4 |
| KÍ-HB | 0-2 |
| VBS-B68 | 0-4 |

**Støðan**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| B68 | 3 | 3 | 0 | 0 | 8-2 | 6 |
| VB/S | 3 | 2 | 0 | 1 | 7-6 | 4 |
| HB | 3 | 1 | 0 | 2 | 3-5 | 2 |
| KÍ | 3 | 0 | 0 | 3 | 1-6 | 0 |